# Viðgerð av persónsupplýsingum, tá ið tú søkir starv hjá Føroya Tele samtakinum



# Viðgerð av persónsupplýsingum, tá ið tú søkir starv hjá Føroya Tele samtakinum

Í sambandi við at tú sendir eina starvsumsókn og tilhoyrandi fylgiskjøl til Føroya Tele samtakið, er tað týdningarmikið, at tú gert teg kunnuga/n við, hvussu Føroya Tele samtakið viðger tínar persónsupplýsingar.

Hetta er galdandi, bæði tá ið tú sendir sjálvbodna umsókn og við støði í einari starvslýsing.

## Viðgerð av persónsupplýsingum

Tær persónsupplýsingar, sum tú letur okkum í sambandi við eina starvsumsókn ella í einari setanartilgongd, verða einans brúktar og goymdar í sambandi við setanartilgongdina og í sambandi við møguliga starvssetan.

Persónsupplýsingar, sum verða savnaðar í einari setanartilgongd, verða viðgjørdar í trúnaði og við neyðugu trygdini. Upplýsingarnar verða einans gjørdar tøkar fyri starvsfólkum, sum hava tørv á tí í sambandi við setanartilgongdina, t.d. fyri einum møguliga komandi leiðara umframt viðkomandi starvsfólkum á Starvsfólkadeildini.

Viðgerðarheimildin hjá Føroya Tele samtakinum er heimilað áhugamál smb. §8, stk 1, pkt 6 í lóg um vernd av persónupplýsingum.

## Samband

Um tú søkir starv við støði í einari serstakari starvslýsing, kanst tú seta teg í samband við persónin, sum er nevndur í lýsingini fyri at fáa fleiri upplýsingar um starvið og um viðgerð av persónsupplýsingum í Føroya Tele samtakinum. Tá ið tú sendir sjálvbodna umsókn, kanst tú senda Starvsfólkadeildini eina umsókn og lívsrensl (CV) umvegis leys størv á heimasíðuni.

## Víðarilating av persónsupplýsingum til triðjapart

Vit brúka í ávísum førum uttanhýsis veitarar í ES í sambandi við starvssetanir. Hetta kann t.d. vera ráðgevingarfyritøkur, veitarar av persónleikaroyndum o.s.fr. Víðarilating til møguligar triðjapartar verður framd í samsvari við skrivligar dátuviðgerðaravtalur.

## Innheintan av viðmæli frá viðkomandi pørtum

At finna best egnaða umsøkjaran til eitt starv í Føroya Tele samtakinum er sjálvsagt eitt áhugamál hjá samtakinum. Í hesum sambandi kunnu vit við viðgerðarheimildini biðja um viðmæli frá fyrrverandi arbeiðsgevarum, útbúgvingarstovnum ella øðrum viðkomandi pørtum. Vit biðja ikki um viðmæli frá núverandi ella fyrrverandi arbeiðsgevara uttan títt samtykki.

## Viðkvæmar persónsupplýsingar

Føroya Tele samtakið ynskir at avmarka viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum. Tí skulu viðkvæmar upplýsingar bert latast samtakinum, um hetta er av týdningi fyri starvssetanina.

Viðkvæmar upplýsingar eru millum annað:

- Uppruni (húðarlitur, ættarslag, etniskur uppruni)
- Sannføring (politisk, átrúnaðarlig, heimspekilig, yrkisfelag)
- Kroppur (heilsa, kynslív, biometri, ílegur)
- Samfelagsligt (revsiverd viðurskifti, munandi sosialir trupulleikar)

Vit nýta persónleikaroyndir í setanartilgongdini fyri summi størv. Hetta er treytað av tínum samtykki. Samtykkið skal latast, tá ið tú fert undir royndina. Royndin verður vanliga gjørd í sambandi við setanarsamrøðuna og hevur til endamáls at lýsa tínar persónligu eginleikar, so vit hava eitt útgangsstøði til samrøðu um tínar persónligu styrkir og veikleikar. Royndin verður veitt av einum uttanhýsis samstarvsfelaga, sum vegna samtakið viðger upplýsingar um teg. Royndin stendur ikki einsamøll, men er partur av samlaða metingargrundarlagnum, tá ið vit velja rætta umsøkjaran til starvið. Starvsfólkadeildin og viðkomandi deildarleiðari í felag velja vanliga rætta umsøkjaran.

Í sambandi við starvssetan til ávís álitisstørv kann tað vera viðkomandi at útvega upplýsingar frá triðjaparti. Um hetta er viðkomandi fyri starvið, sum tú søkir, biðja vit um títt samtykki, áðrenn vit útvega tílíkar upplýsingar.

## Goymsla av persónsupplýsingum

Føroya Tele samtakið goymir upplýsingar um umsøkjarar innanhýsis og hjá uttanhýsis samstarvsfeløgum í Føroyum og ES. Samstarvið við veitararnar er fevnt av skrivligum dátuviðgerðaravtalum, sum eru í samsvari við dátuverndarlógina.

## Tíðarskeið fyri goymslu av persónsupplýsingum.

Føroya Tele samtakið goymir tína umsókn, fylgiskjøl o.s.fr., inntil umsóknin er viðgjørd. Tá ið talan er um umsókn til eina serstaka starvslýsing, verða skjølini goymd, inntil setanartilgongdin er endað, tó í mesta lagi í 6 mánaðar. Um tú fært starv í samtakinum, verða tær upplýsingar, sum vit hava savnað inn í sambandi við setanartilgongdina, goymdar í samsvari við okkara innanhýsis reglur fyri viðgerð av persónsupplýsingum um starvsfólk.

## Tíni rættindi

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í sambandi við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.

- Rætturin til innlit: Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.
- Rætturin til rætting: Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálva/n rættaðar.
- Rætturin til striking: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.
- Rætturin til viðgerðaravmarking: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónsupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónsupplýsingarnar.
- Rætturin til dátuflutning: Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónsupplýsingar
  útflýggjaðar í einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum skapi, og at fáa hesar persónsupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.
- Rætturin til mótmæli: Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.
- Rætturin at biðja um endurmeting av livandi persóni í støðum, har avgerð er tikin, ið er grundað á sjálvvirkandi KT-skipan.

Umbøn um innlit v.m. verður svarað skjótast gjørligt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at hon er móttikin. Um serstøk viðurskifti so sum nøgd og torgreidni gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Tú fært serstøk boð frá okkum, um freistin verður longd, og tá umbønin er svarað.

Tú ert vælkomin at seta teg í samband við okkum, um tú hevur spurningar um tíni rættindi, ella um hvussu vit viðgera tínar persónsupplýsingar. Tú kanst seta teg í samband við okkara dátuverndarfólk:

Finnbjørn Simonsen
Teldupostur: dpo@ft.fo

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/ur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á heimasíðuni www.dat.fo.